tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Breiða semjan

*Oddagrein*

TAÐ kann staðfestast rættuliga greitt, at tað finst ein breið politisk semja um ríkisrættarligu støðuna. Semjan er sum nú er uttan um Tjóðveldisflokkin. Um hesin flokkur skal vera við, so má hann sleppa kravinum um, at avgerðin um at loysa frá danska ríkinum verður tikin her og nú.

TANN avgerðin eigur sambært javnaðaruppskotinum at verða tikin, tá ið vit hava fíggjarligan og umsitingarligan førleika at loysa. Tá og um loyst verður, so eigur tað at verða við egnum forseta og gjaldoyrasamstarvi við Europasamveldið, ikki við Danmark. Nær tíðin er fíggjarliga búgvin at loysa vil altíð verða ein subjektiv vurdering - alt eftir hvørji vælferðarkrøv, ið verða sett.

TAÐ, sum í dag, tykist meira ræðandi er tað politiskt umsitingarliga maktarloysi, ið ræður. Heilsu- almenna og samferðsluøkið eru í andaleypi. Hettar eru málsøki, ið vit hava umsitið í áravís. Tey virkaðu rímuligt og fóru ikki í smildur sjálvt tá kreppan leikaði harðast. Nú samfelagið kom fyri seg aftur og peningaligu fyritreytirnar batnaðu fór alt í smildur. Hetta bøtir ikki um álitið til okkara politisku evni, sum umsitarar av einum sjálvstøðugum Føroyum. Enn eru so umsitingarøki fyri eina 200 milliónir eftir at yvirtaka og umsita.

HER skulu pengar og politiskur umsitingarligur dugnaskapur til. Í dagsins Føroyum ein mangulvør vísir tað seg. Hinvegin so kann ongantíð leggjast nóg stórur dentur á, at tað hevði verið ein sigur fyri fólkaræðið, um løgtingið einmælt samtykti ein nýggjan sáttmála við Danmark.

HETTA kann lættliga henda bert Tjóðveldisflokkurin sleppur kravinum um, at avgerðin um loysing ella ikki skal takast nú. Hinvegin, um so verður, at semjan uttan um flokkin verður formaliserað, so verður trupult at koma aftur um aftur tey nógvu næstu árini. Tað stendur, ið hvussu er fast.

***Sosialurin***

## Lesarabrœv:

## Ein hugsjónarlig jarðarferð

Eg havi verið millum teirra, sum altíð havi hildið, at teir náttúrligu partamenninir í føroyskum politikki vóru Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin høgrumegin, og Javnaðar- og Tjóðveldisflokkurin vinstrumegin. Eg havi hildið at hesir báðir seinni høvdu so nógv í felag hugsjónarliga, og at løgdu teir kreftirnar saman, høvdu teir kunna lyft føroyska samfelagið langt framá við progressivum reformum á øllum samfelagsøkjum.

Eins og nógv onnur var eg tí ómetaliga harmur, tá vit fyri skjótt tveimum árum síðani sóu Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin skipa samgongu.

Prísurin fyri hesa fullveldissamgongu hevur verið øgiligur fyri Tjóðveldisflokkin. Alt annað hevur verið til sølu til frama fyri hesum eina máli. Enn er ikki tvey ár runnin, men tó hava vit ferð eftir ferð upplivað, hvussu tann hugsjónarliga útsølan hjá Tjóðveldisflokkinum hevur ført til, at allar hyllar á vinstra borði eru blivnar skralltómar meðan tað fyllist upp høgrumegin.

Mikudagin í síðstu viku vóru tvey stórmál til aðru viðgerð á løgtingi: uppskotið um fyrsta útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetni, og anlegslógin um fast ssamband um Vestmannasund. Undir viðgerðini av og síðani atkvøðugreiðsluni um hesi málini, sóu vit tann síðsta av teim gomlu hugsjónarmonnunum í Tjóðveldisflokkinum, tann valda formannin Heini O. Heinesen, geva seg endaliga yvir.

Nýliberalistarnir við varaløgmanni Høgna Hoydal og tingformanninum Finnboga Ísakssyni á odda hava tikið yvir og sett sum nýtt skjaldramerki yvir Tjóðveldisflokkin, at tað eru ikki longur samfelagsáhugamálini sum eru tey stýrandi, men tær fríu marknaðarkreftirnar.

Onnur viðgerðin mikudagin, har Tjóðveldisflokkurin avlívaði landsverkfrøðingin til frama fyri Partafelagið hjá Finnboga Arge og Klæmint Weihe, og seinni sama dag avreiddi møguleikarnar fyri almennari luttøku í komandi føroysku oljuvinnuni, var sum hugsjónarlig deyðsboð av Tjóðveldisflokkinum.

Fríggjadagin hevði ein so kensluna av at verða til jarðarferðina. Tá var triðja og



endaliga viðgerðin av hesum báðum nevndu málum. Hetta gjørdist eisini Tjóðveldisfloksins endaliga avreiðing av samfelagsáhugamálunum yvir teirri framkomnu byggitøknini og yvir eini komandi føroyskari oljuvinnu.

Føroya Løgting hevur útgivið ein upplýsandi faldara um m.a. tingskipanina og flokkarnar. Har er eisini ein mynd, sum umframt at vísa støðu flokkanna í sjálvsstýrisspurninginum til loysing og samband, eisini vísir flokkarnar eftir samfelagspolitiskum hugsjónarstøði frá vinstru til høgru. Har stendur Tjóðveldisflokkurin vinstrumegin Miðflokkin og Sambandsflokkin. Men soleiðis er ikki longur — tí vit hava nú í skjótt tvey ár upplivað ferð aftaná ferð, at næstir eftir Javnaðarflokkinum á vinstru síðu liggja nú Miðflokkurin og Sambandsflokkurin sum teir sosialliberalu flokkarnir í Føroyum. Tjóðveldisflokkin hevur flutt seg yvirum høgrumegin. Og hasumegin hava vit so nú Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin sum teir klassisku konservativu flokkarnar og Tjóðveldisflokkin sum nýliberalistarnir.

Hetta er undarligt at noyðast at staðfesta, at út frá teimum hugsjónum, sum koma til sjóndar í tí førda politikkinum, so er hetta er tað samstarvið millum flokkarnar sum ídag tykist at verða tað mest náttúrliga.

Nú skal eisini sigast, at tað er komið fyri, at onkur, sum varð hildin at vera deyður, í síðstu løtu raknaði við og kom til lívs aftur. Óivað kann hetta koma oftari fyri í tí politiska heiminum enn í biologiska. Men tað stendur so til Tjóðveldisflokkin at vísa í viðgerðini av komandi málum, um hansara hugsjónarliga hóttafall er ein skinndeyði, hann kann vakna úr. Nógv við mær høvdu frøtt seg um tað.

**Hans Pauli Strøm,**
**javnaðartingmaður**

## Nú er vandi á ferð

Hevur tú eina meining ella eitt uppskot, sum tú sigur alment í Føroyum í dag, verður pápi tín alment viðgjørdur afturímóti. So langt eru vit komin. Tilráðingin frá Búskaparráðnum um fiskidagabanka hevur gjørt fólkafloksmenn og reiðarar púra svakar. So svakar, at teir heilt hava mist alt fyrilit og avdúka eina muru, sum fær kalt at renna eftir rygginum á fólki, sum dagliga hoyra um, hvussu Europa hartar Eysturríki fyri sínar fascistisku tendensir. Í Fimmaranum mikudagin førdi fiskimálaráðharrin, Jørgen Niclassen, seg fram á ein so skammiligan hátt, sum ikki eigur at koma fyri. Hann var komin í útvarpsstovuna at viðgera eina tilráðing frá Búskaparráðnum. Hildu lurtararnir. Men maðurin brúkti tíðina til at viðgera útbúgving teirra, sum skrivað høvdu tilráðingina.

Tað sigur vanligum fólki so mikið sum, at hann visti ikki, hvat hann vildi har handan dagin. Hann var so avsporaður, og hann gjørdi sær so fullkomuliga fyri skommum, at tað hevði...“betri verið honum heima at sitið, tann fuglaflokk at fanga.“

Í Dimmalætting hósdagin - dagin eftir Fimmaran - fer Osmund Justinussen eitt vet longri enn fiskimálaráðharrin. Hann heldur seg ikki bara til, hvussu lærdir limirnir í búskaparráðnum eru. Nei, hann ger sær sanniliga tann ómak at siga okkum føroyingum, hvussu virkin foreldur teirra hava verið í føroyskum vinnulívi.

Hygg! Hetta, vit nú eru vitni til, er rættiliga vandamikið. Her hava vit eitt ráð, sum er sett at ráðgeva Landsstýrinum. Ráðið kemur við eini tilráðing, sum arbeiðssetningurin jú er. Men í staðin fyri at viðgera tilráðingina seriøst og fakliga, verða ráðslimirnir og familjur teirra viðgjørd alment í føroyskum fjølmiðlum.

Tað er vanligt, at tá tú traðkar á halan á frensinum, so fýsir hann. Men hesi ýlini, sum nú hoyrast frá teimum, sum halda seg hava einarætt til fiskivinnu undir Føroyum, eru nógv vandamiklari enn ein frensur, sum kanska kann klóra eitt sindur.

Taktikkurin er púra greiður. Hann gongur út upp á at fáa einhvønn, sum bara so mikið sum dittar sær at hugsa um at broyta verandi skipan, at tiga. Tað gerst sera effektivt við at leggja eftir manninum. Og helst familjuni eisini. Tað hevur virkað fyrr.

Men tað ringasta eru viðmerkingarnar frá fólki eftir sendingina í Útvarpinum mikudagin. Mangastaðni er vanlig mannahugsan, at formaðurin í Búskaparráðnum slapp alt ov væl. Teir skuldu farið nógv verri við honum, verður sagt.

Tað er óhugnaligt, at føroyingar ikki eru komnir úr miðøldini enn. At fólk enn troðkast saman um skafottið ella bálstaðið at síggja, meðan hesin ella hasin verður avrættaður.

Jú, sanniliga hevur Jørn



Astrup Hansen rætt: „Man brænder da hekse.“

**Edvard í Skorðini Joensen**

†

Tað verður hervið kunngjørt ætt og vinum at elskaði pápi, verfaðir og abbi okkara

**FINNBOGI DAM JACOBSEN**

andaðist á landssjúkrahúsinum 5. feb, 59 ára gamal. Børan fer frá landssjúkrahúskapellinum týsdagin 8. feb. kl. 18.

Jarðarferðin verður frá Frelsunarherinum mikudagin kl. 14.

*Familjunnar vegna*

**Lillian, Jannie, Linda, Bogi, Laura og abbadótturin**

Tey, ið vilja minnast Finnboga, kunnu lata eina peningagávu til Herbergið hjá Frelsunarherinum, konto í peningastovnunum.





Sosialurin - 311820